# Hýsu-og upsaportiónir í Miðvági

**– Eg trúgvi, at flestu virkir miðja eftir at virka fiskin meira, og tað gera vit eisini í Miðvági, sigur Albert Ellefsen, virkisleiðari**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Fiskavirking í Miðvági var eitt av teimum trimum virkjunum í Føroyum, sum í summarhálvuni keypti gullaks frá trolarunum, sum vóru á hesi veiði.

Gullaksatíðin var liðug síðst í september, og nú veturin stundar til, hevur virkið serliga lagt seg eftir at arbeiða hýsu og partvís upsa.

Soleiðis hevur eisini verið undanfarin ár.


*– Tað gongur hampiligt at fáa fatur á hýsuni, men prísirnir eru ógvuliga skiftandi, sigur virkisleiðarin á Fiskavirking í Miðvági.*

**Portiónir**

Miðjað verður eftir í størst møguligan mun at virka fiskin til portiónir, men ein partur av upsanum fer í blokk.

Albert Ellefsen, virkisleiðari, sigur, at gongst sum ætlað í vetur, verða eini 75% av rávøruni hýsa, sum serliga kemur frá línubátunum, men eisini frá trolarunum.

Hann sigur, at meginparturin av hýsuni, sum virkið keypir, er hýsa 3.

– Vit kundu hugsað okkum, at hýsan var nakað størri, men higartil í heyst hevur hon yvirhøvur verið smáttfallandi.

Albert sigur, at tað hevur gingið hampiligt at fáa fatur á hýsuni, men prísurin er rættiliga skiftandi.

Hann heldur, at ein stórur partur av hýsuni, sum skipini hava siglt niður á skotska marknaðin við, hevur verið smá hýsa.

**Vilja meirvirka**

– Eg trúgvi, at flestu virkir miðja eftir at virka fiskin meira, og tað gera vit eisini her vesturi. Tilvirkingin avhongur sjálvsagt eisini av eftirspurningi og prísi úti á marknaðinum, leggur Albert aftrat.

Mikudagin, tá ið vit frættu úr Miðvági, lógu West Freeser og Venus og landaðu, men virkisleiðarin, sum júst var afturkomin úr Japan, hevði ikki hevt seg við neyvu tølini hjá bátunum.

– Í Miðvági er nógv fiskaarbeiði hvønn dag, sigur Albert Ellefsen, virkisleiðari.

# Seks línubátar landað í Klaksvík

**- Flakavirkið, Kósin, hevur keypt ein part av veiðini beinleiðis frá skipunum. Restin fer so um uppboðssøluna, sigur Kristian Fr. Olsen, leiðari á Fiskamarknaði Føroya í Klaksvík**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*


*– Toskaprísurin hevur verið í lagi í vikuni, og prísurin á hýsu hevur verið sámuligur, sigur leiðarin á Fiskamarknaði Føroya í Klaksvík, Kristian Fr. Olsen.*

Higartil í vikuni hava seks línubátar landað til Fiskamarknaðin í Klaksvík. Ein partur av veiðini er seldur um uppboðssøluna og ein partur beinleiðis til Kósina í Klaksvík.

Í dag kemur Núpur undan Íslandi við 140-150.000 pundum av toski, hýsu, brosmu og longu. Hetta er fyrsti túrurin hjá teimum undir Íslandi á hesum sinni. Fyrr í vikuni hava fimm aðrir línubátar selt um uppboðssøluna.

Jákup B, sum royndi undir Føroyum, hevði 130.000-140.000 pund, meginparturin hýsa og toskur og Polarstjørnan, sum var undir Íslandi, hevði 180.000 pund av toski, hýsu, brosmu og longu.

Kvikk, Skørin og Váðasteinur hava eisini lagt fiskin upp í Klaksvík.

Kvikk hevði 130.000-140.000 pund, meginparturin hýsa, Skørin 70.000 pund, størri helmingurin toskur, og Váðasteinur hevði eisini 130.000-140.000 pund. Hjá Váðasteini var eisini størra helvtin toskur.

**Landa fyri Kósina**

Kristian Fr. Olsen, leiðari á Fiskamarknaði Føroya í Klaksvík, sigur, at fleiri av bátunum seldu ein part av veiðini beinleiðis til Kósina, meðan restin fór um uppboðssøluna.

– Men allur fiskurin verður landaður og vigaður her á Fiskamarknaðinum. Vit landa bæði fyri okkum sjálvar og Kósina. Síðan gera vit skipini út við kassum, ísi og agni, sigur hann. Kristian Fr. Olsen sigur, at toskaprísurin hevur verið í lagi hesar dagarnar, og prísurin á hýsu hevur verið sámuligur.

## Nógvur fiskur upp á Sandi

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Í vikuni hava ikki færri enn tvey línuskip og tríggir trolarar lagt veiðina upp á Sandi.

Línubátarnir eru Hoyvíkingur og Thomas Nygaard og trolararnir, sum allir landaðu í gjár, eru Nornagestur, Kolumbus og Eysturbúgvin.

Tá ið vit frættu av Sandi í gjár, høvdu tey ikki neyvu tølini yvir landingarnar við hondina, og neyvan vóru skipini heldur liðug at landa.

Á Sandoy Seafood siga tey annars, at meginparturin av fiskinum verður arbeiddur á virkinum á Sandi og í Skopun. Bert ein minni partur er keyptur av øðrum virkjum og fer av oynni.

– So, her hava vit ríkiligt at takast við í løtuni, siga tey á Sandoy Seafood.

Tað er greitt, at tá ið fimm skip leggja veiðina upp á Sandi í eina viku, eru nógvir mans eisini knýttir av landingunum.

Tí er tað ikki bara inni á virkjunum, at nógv hevur verið at tikist við hesa vikuna, men so sanniliga eisini úti á bryggjuni á Sandi.



# 289 bilar missa nummarpláturnar

**– um vegskatturin ikki verður goldin beinanvegin, og kvittan er tøk at vísa politinum, verða nummarpláturnar kliptar, og hevur Bileftirlitið latið løgregluni 289 slík mál**

VEGSKATTUR


*Løgreglan hevur fingið boð um at klippa nummarpláturnar av 289 bilum, hvørs eigarar ikki hava rindað vegskattin*

Talan er um vegskattin fyri seinna hálvár í ár, sum Bileftirlitið ikki hevur fingið fatur á.

Veggjaldið fellur í tveimum, 1. januar og 1. juli., og eins ofta hevur Bileftirlitið boð eftir løgregluni fyri at fáa fatur á øllum pengunum, tí hvørja ferð eru tað nøkur, ið ikki gjalda rættstundis.

Enn ber til at gjalda, og við at vísa fram kvittan slepst undan, at pláturnar verða kliptar.

# Brúkarasamtak verður nú stovnað

**Mikudagin í næstu viku verður stovnandi fundur av samtaki fyri brúkarar í Føroyum. Tað eru tey trý, Hans Pauli Strøm, Ingunn Simonsen og Gunnleivur Dalsgarð, sum vegna fyrireikararnar hava kallað inn til fundin**

BRÚKARAMÁL
*Eirikur Lindenskov*

– Vit eru illa stødd, tá tað snýr seg um at tryggja og verja rættindi brúkarans í Føroyum - í høvuðsheitum tí, at eingin myndugleiki varðar av ella kærir seg um brúkaraviðurskifti, siga fyrireikararnir í tíðindaskrivi. Tey siga víðari, at hetta vistu tey frammanundan, men at tað kom pínliga í ljósmála, tá Norðurlendska Brúkaranevndin hevði sín ársfund í Føroyum um miðjan september.

– Vit mugu eisini sanna, at politiski myndugleikin hevur ikki verið og tykist ikki vera sinnaður at gera nakað við hesi viðurskifti. Hetta ber illa til longur, og tí mugu brúkararnir í Føroyum sjálvir taka seg saman í felagsskap, við tí endamálið at fáa hesi viðurskifti í rætt lag, siga tey trý, og bjóða tey tí øllum áhugaðum til fundar til tess at stovna nýtt samtak fyri brúkarar í Føroyum fyri at verja áhugamál brúkaranna og virka fyri teimum, m.a. við

- at gera vart við sjónarmið brúkaranna í almennum orðskifti,
- at vera málgagn fyri brúkaraáhugamálum mótvegis politiskum myndugleikum, og
- at virka fyri at almennur brúkarapolitikkur verður orðaður og settur í verk, við dagførdari lóggávu og almennum brúkarastovni, til tess at fremja brúkarakunning og tryggja brúkarunum rættindi teirra

Lagt verður upp til at bæði einstaklingar og feløg kunnu verða limir, og vónandi verður undirtøkan stór longu á stovnandi fundinum.

Fundurin verður mikukvøldið tann. 30. oktober 2002, kl. 19.30, í húsunum hjá Starvsmannafelagnum, J.H. Schrøtersgøta 9, Tórshavn.

# Listastevnan heiðrað við 75.000 krónur

**Á áttinda sinni letur danski Wilhelm Hansen grunnurin heiðurslønir og gávufæ. Millum tey, sum í ár verða heiðrað, er Listastevna Føroya**

HEIÐURSLØN
*Eirikur Lindenskov*

Oddvá Nattestad, samskipari, tekur í móti stuðulinum áljóðandi 75.000 kr, sum verður handaður á samkomu á Kunstindustrimuseet í Bredgade í Keypmannahavn hin 29. oktober.

– Hetta er ein stór viðurkenning av Listastevnuni og ikki minst eitt kærkomið høvi at gera vart við stevnuna uttanfyri landoddarnar, sigur Oddvá, sum longu arbeiðir við næstu Listastevnu, sum verður hildin í døgunum 7.-17. august 2003.

Umframt at føroyska Listastevnan verður heiðrað, fáa eisini sjónleikarin, Kirsten Olsen, og koreografurin, John Neumeir, serliga heiðursløn fyri listarligt avrik. Heiðurslønin sum tey bæði fáa frá Wilhelm Hansen grunninum er 250.000 kr.


*Oddvá Nattestad tekur ímóti teimum 75.000 krónunum til Listastevnuna*

